**FERÐAFRÁSØGN** *Eydna Skaale • eydna@sosialurin*




# Mamma Mia!

**Bæði Skeyk og sangleikurin um Jósef vóru óvanliga væl umtóktir í Føroyum. Og tað við góðari grund. Sangleikir hava ein eginleika at ganda áskoðarararnar á ein heilt serligan hátt. Sum áskoðari er tað kanska lættari at fyrihalda seg til kenslur sum sorg og gleði, tá tað verður komplimenterað við tónleiki. London er heimskendur fyri sínar sangleikir. Kemur tú higar, er tað heilt víst eitt 'must' at fara til musical.**

## Mamma Mia -the Abba musical!

Hetta er ein heldur nýggur sangleikur, har søgan er bygd á allar teir góðu, gomlu Abba sangirnar. Tað ger, at tú allatíðina kennir teg aftur í sangunum og kanst syngja við. Samstundis er søgan púra ókend og tú ánar ikki hvat fer at henda næst. Tað ger, at tú verður fullkomiliga bergtikin. Gomlu sangirnir fáa veruliga eina aðra meining, eftir at teir verða settir í samband við hendingarnar og kenslurnar á pallinum.

Søgugongdin er tann, at ein genta og mamma hennara búgva á eini lítlari griskari oyggj. Gentan veit ikki hvør pápi hennara er, og mamman vil ikki siga henni. Men so skal gentan giftast, og hon vil so fegin verða leidd til altars av pápa sínum.

Hon finnur gomlu dagbókina hjá mammuni og finnur útav, at tað eru 3 møguligir pápar. Eftirsum hon vil vita hvør er pápi hennara, ger hon ikki mætari enn at bjóða øllum 3 niður til oynna, júst um tað mundi, sum brúdleypið skal standa.

Í fyrsta umfari tykist hetta kanska ikki akkurát vera ein søga sum kann tvinnast saman við Abba tónleiki, men tað hepnast ófatuliga væl.

### Prince Edward Theatre

Hetta er eitt av størru teatrunum, við plássi fyri 1.600 fólkum. Tað liggur mitt í Soho umráðnum, og kontrasturin millum gøtuna og salin er ógvuliga stórur. Soho er larmuta og litfagra kinesara umráðið, meðan teatrið er sera flott og hábærsligt. Tað merkist eisini at fólk broyta atburð, tá tey koma inn. Larmur og fjas hvørva sum døgg fyri sól, tí flottu hølini krevja ein sømiligan atburð. Tað er sera høgt til loftið og setrini eru breið og bleyt, av reyðum velouri. Flott útskornar balkongir eru allanvegin upp til loftið og hjálparfólk eru allastaðni. So hvørt sum fólk koma inn í salin, verða tey biðin um at vísa atgongumerki og so verða tey leidd upp á pláss. Huglagið er hátíðarligt, og fólk práta spakuliga sínamillum.

Ein kinesaradama gongur runt við eini eskju og selir góðgæti. Hennara ógvuliga avmarkaða enska minnir okkum á, at vit hóast alt eru í Soho.

Salurin er næstan fullsettur og her eru øll hugsandi fólkasløg. Havi altíð hildið, at teatrið sum heild hevur verið fyri pent ílætin, mentað fólk, men tað vísir seg ikki at vera so. Nøkur eru, sum veruliga hava pyntað seg, meðan onnur eru í sandalum, shorts og við myndatóli um hálsin. Her eru heilt smá børn og gomul fólk.

> „Oh my God, it's just bloody amazing"

### Leikurin

Alt í einum buldrar tónleikurin út gjøgnum hátalararnar. Teppið er framvegis drigið fyri, men tað instrumentalska lagatyssið, sum spælt verður, lættir um huglagið inni í salinum, og fólk byrja at nikka og svinga við høvdinum í takt við tónleikin.

Vit verða biðin um at sløkkja fartelefonlar og so fer teppið frá.

Pallmyndin er sera einføld, so umstøðurnar, har leikurin fyrigongur, verða í stóran mun latnar upp til hvønn einstakan at ímynda sær. Tað ger, at tú sum áskoðari ert sera aktivt við í leikinum. Eitt annað, sum ger, at tú veruliga kennir teg sum part ev leikinum er, at tú aldrin ert í iva um hvørjar kenslur leikararnir spæla uppá, tí gjøgnum sang, tónleik og mimik, kennur tú kenslurnar tær sjálvur. Gleði, forelskilsi og sorg. Eg varnaðist t.d. fleiri ferðir, at eisini síðukonan turkaði sær um eyguni, eftir ein rørandi part av leikinum.

Á konufólka wc'num í steðginum, var veruligur krákufundur. Alt var á gosið. „Oh my God, it's just bloody amazing, ain't it", var nokk neyvasta lýsingin av leikinum, sum eg hoyrdi.

Endin á leikinum var nakað hugtungur, so fyri at fáa fólk í betri lag aftur, komu leikarar og dansarar útaftur á pallin, við einum bombastiskum og energiskum sang- og dansishowið, við nøkrum av teimum lívligastu Abba sangunum. Allur salurin reisti seg upp og fór at klappa og shaka. Hevði eitt dansigólv verið, so vænti eg at tað hevði verið fult eftir eini lítlari løtu. Eg má siga, sum ein onnur dama segði inni á wc'num: Eg visti ikki av, at mær dámdi so væl Abba.

### Stomp

Eitt annað show, sum eftirhondini hevur gingið í fleiri ár, eitur stomp. Eisini hetta er vert at síggja. Talan er um eitt fullkomiliga øðrvísi rútmiskt show.

Ikki eitt orð verður sagt, og einki instrument verður nýtt. Ístaðin spæla tey 8 fólkini á pallinum uppá ymisk ting úr gerandisdegnum, sum t.d. kustar, vask, skrellispannir, svávuldósir, kurvabóltar og sínar egnu búkar. Tey nýta nógvan mimik, og aftanfyri vælsvingandi og óvanligu rútmurnar, er ein stuttligur undirtóni.

Í tann hálvanannan tíman, sum Stomp vardi, fekk eg heilt einfalt eina bergtakandi uppliving. Tey dugdu ómetaliga væl at fáa áskoðararnar við. Av og á dugdu vit ikki nóg væl og fingu tískil strong eygnabrá frá „leiðaranum" á pallinum. Sum um vit ódugnaligu áskoðarar bara oyðiløgdu teirra show við ikki at megna at fylgja við. Vit dugdu ov illa at klappa í takt, tá tað skuldi gerast skjótt.

Eftir showið, tyktust fólk vera vælnøgd, tí løgvabrestirnir vildu ongan enda taka, og neyðars útlúgvaðu rútmusnillningarnir á pallinum máttu út at bukka umaftur og umaftur.

Ein ávaring má tó gevast, um tú kundi hugsað tær at farið til Stomp. Vandi er fyri sera stórari rútmiskari ávirkan. Restina av degnum gekk eg í øllum førum og trummaði uppá alt, sum var í nánd, allarhelst til stóran ampa fyri mínar næstar.



VINN FERÐIR TIL LONDON



# Kennir tú London?

Sosialurin hevur vitjað stórbýin London, og har hevur ein av okkara blaðkvinnum verið runt og sæð, hvat enski høvuðsstaðurin hevur at bjóða. Tað fer hon at greiða frá her í blaðnum, og vit geva tær eisini møguleikan at uppliva henda spennandi bý. Sosialurin skipar nevnliga fyri einari kapping millum lesararnar, har vit burturluta 10 ferðir til London. Hvørja viku draga vit um tvær flogferðir við Atlantic Airways til London.

**Kappingarreglar:**
Kappingin byrjar fríggjadagin 28. mai og heldur fram í fimm vikur. Teir fimm fríggjadagarnar prenta vit eina grein um London, og vit seta eisini tríggjar spurningar, sum tit skulu svara. Tey, sum svara spurningunum, og senda svarini til Sosialin, eru við í lutakastinum um ferðirnar. Svarini skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi mikudagin eftir, at teir hava verið í blaðnum. Loyvt er ikki at senda avrit av síðuni úr Sosialinum, tí bert veruligar blaðsíður kunnu brúkast í kappingini.



Sosialurin ATLANTIC AIRWAYS

**Vinnarin í seinastu viku:**
Vanja Engskær
Niðaragøta 76
188 Hoyvík

ATLANTIC AIRWAYS

*Navn á luttakara:*

*Bústaður:*

**Klipp lepan út og send til Sosialin**

Postboks 76
FO-110 Tórshavn
Tel. 341 800 • Fax 341 801
Sosialurin

1. Í hvørjum umráði í London liggur Prince Edward Theatre?
   *Svar:*
2. Mamma Mia er bygdur á sangirnar hjá einum kendum, fyrrverandi tónleikabólki. Hvørjum?
   *Svar:*
3. Hvussu nógv fólk eru á pallinum í rútmiska showinum Stomp?
   *Svar:*

www.hestprent.fo